# Javnaðarhugsjónin fremsta mál



Val

EILEY WEIHE
Javnaðarflokkurin

Hóast eg brenni fyri lokalpolitikki og havi nokk at takast við í teimum álitisstørvum, eg havi í Sørvágs bygdarráð, so var eg als ikki í iva, tá eg fekk áheitan um at koma uppá listan hjá Javnaðarflokkinum til fólkatingsvalið. Sjálvsagt veit eg, at eg ongan møguleika havi at gera meg galdandi. Tó haldi eg, at vit hava nógv góð kvinnulig valevni á javnaðarlistanum hesaferð, og at møguleikin at fáa eina kvinnu á fólkating kanska ongantíð hevur verið betur.

**Gott javnaðarval**

# Ein tøkk til Karsten Hansen!



Val

JENIS AV RANA
floksformaður
Miðflokkurin

Eftir hólmgongusendingina, ið var send í útvarpinum fríggjakvøldið, har Karsten Hansen fyri Miðflokkin og Sjúrður Skaale fyri Tjóðveldi tóku lut, fari eg, Miðfloksins vegna, at takka tær Karsten, at tú ikki fórt niður í runudíkið til Sjúrð.

At Sjúrður slapp at vísa okkum innastu hugsanir sínar, og sítt hatur móti teimum, ið loyva sær at hugsa øðrvísi enn hann, var skakandi, men neyðugt. Gott at tú, tóat freistingin at fara niður á sama støði at svara aftur man hava verið stór, ikki gav eftir.

Takk fyri at tú dugdi tað, hann ikki dugdi- at stýra sær.

Sjálvur havi eg áður kontakta Sjúrð, gjørt hann varugan við feilcitatir, og við skeivleikan í at endurgeva smábrot, sum hann tekur úr størri samanhangum. Havi eisini roynt at greitt honum frá tí ódámliga í at gera niðurstøður út frá citatum frá øðrum- og so látast, sum hesar niðurstøður eru framborinar av persóninum sjálvum. Og hann hevur givið mær rætt, biðið um umbering- men heldur síðani á í sama spori.

Slíkt kanst tú neyvan verja teg ímóti, men bert vóna, at hann vaknar og sær vandan, áðrenn hann renur seg í óføri.

Enn einaferð- takk fyri Karsten!

**Miðfloksins vegna**

# Svar til Anniku W. Joensen um kvinnur í politikki



Val

HØGNI HOYDAL
tjóðveldi

Annika W. Joensen hevur spurt allar floksformenn um javnstøðumál. Spurningurin verður hervið svaraður:

Tjóðveldi hevur í hesum valstríði og fer í valstríðnum til løgtingsvalið at hava javna umboðan av monnum og kvinnum.

Vit boðaðu fyri fleiri mánaðum síðani frá, at aðalstjórnin í Tjóðveldinum hevði tikið undir við:

At í valstríði fáa kvinnur og menn javna rúmd.

At í landsstýri og øðrum álitissessum fer Tjóðveldi at hava javna umboðan av monnum og kvinnum.

At Tjóðveldi er í ferð við at orða ein javnstøðupolitikk fyri alt samfelagiðí breiðari merking. (Fyrsta stigið er uppskotið hjá okkum á tingi um miðvísa gransking av javnstøðumálum í samfelagnum, sum tú finnur á heimasíðu løgtingsins og á www.tjodveldi.fo undir “tingarbeiði”.

**Við bestu kvøðum**

# Tí Javnaðarflokkin !



Val

JÓANNES EIDESGAARD
Javnaðarflokkurin

Í samfull 100 ár hevur Sambandsflokkurin verið sannur afturhaldsflokkur, tá tað hevur snúð seg um ríkisfelagsskapin. Hesin skuldi konserverast og ikki rørast. Heldur ikki, tá Javnaðarflokkurin í 1948 gekk á odda at fyri fáa Heimastýrislógina.

Í samfull 60 ár hevur Tjóðveldið verið loysingarflokkur, sum í orðum hevur vilja loyst heldur í dag enn í morgin. Forrestin hildu rættir tjóðveldismenn fyrr, at flokkurin ikki hoyrdi heima á Fólkatingi, men nú er alt øðrvísi. So øðrvísi, at nú mugu tjóðveldismenn ikki siga loysing, um nakar annar hoyrir.

Men hesir báðir flokkar liva framvegis av at taka patent upp á ríkisrættarligu støðuna. Teir royna at billa okkum inn, at tað eru bert hesir báðir flokkar, sum hava eina støðu til ríkisfelagsskapin. Tað liva teir av. Men hetta er so ósatt, sum nakað kann vera.

Øll eiga at vita, at hóast Sambandið í 100 ár og Tjóðveldið í 60 ár hava stríðst fyri hvør sínum máli, so hevur tíbetur hvørgin fingið rætt. Felagsskapurin hevur broytt seg ótrúliga nógv, hóast Sambandið hevur ynskt tað beint tað øvugta, og loysingin er ikki komin, hóast Tjóðveldið hevur ynskt hana.

Og orsøkin er tann einfalda, at Javnaðarflokkurin javnt og samt hevur broytt felagsskapin. Javnaðarflokkurin hevur broytt ríkisfelagsskapin soleiðis, at vit alla tíðina hava havt røttu karmarnar til at menna vælferðina í Føroyum, sum jú er okkara fremsta politiska høvuðsmál.

Og tað er júst hetta vit bjóða okkum til til fólkatingsvalið týsdagin.

Vilt tú onga broyting, so vel bara Sambandið.

Vil tú loysing, so vel bara Tjóðveldið.

Vilt tú hava ein liviligan og rúmligan ríkisfelagsskap, sum alla tíðina mennir seg og skapar møguleikar, so velur tú sjálvandi Javnaðarflokkin.

**Tí Javnaðarflokkin**

# Hví drálar Bjarni Djurholm?



Val

EILEY WEIHE
Javnaðarflokkurin

Frá 1998 til 2004 sat Fólkaflokkurin við flogvallarmálinum í landstýrinum. Av teimu átta árunum, sat Bjarni Djurholm fýra ár.

Tað einasta, sum hendi var ein stór konfrontation við danir øll hesi árini. Eitt tað fyrsta, ið Jóanes Ejdesgaard gjørdi sum løgmaður var, at hann tók flogvallarmálið úr hondunum Bjarna Djurholm. Og gjørdi hann ikki tað, so hevði Fólkaflokkurin framvegism hildi sítt kvørkratak um flogvallarmálið nú skjótt tíggju ár eru liðin. Og mín sann nú tað er gingið hálvt annað ár síðan avtalan um at útbyggja Vága floghavn var klár, og 365 mill kr seinasta árið hava verið tøkar so er als einki hent. Nú mundi eg sagt ósatt, tí hesa tíðina hava Bjarni Djuurholm og Poul Michelsen lagt alla orku í at fáa ein altjóða flogvøll gjørdan á Glyvursnesi. Ein og aleina fólkaflokkinum fyri at takka. Vága floghavn er niðurpínd viðvíkjandi innflúgvingartólum eins og terminalurin als ikki kann nøkta tann ógvusliga vøkstur við ferðafólki. Tí er tað nógv fyri at hoyra ábreiðslur um óregularitet, tá ið orsøkin er at Vága Floghavn hevur verið gíðsil í einum politiskum spæli seinastu tíggju árini.

# Hví luttaka



Val

ÓLUVA NICLASEN
matvørufrøðingur, Velbastað

Hví valdi eg at játta áheitanini frá Javnaðarflokkinum um at vera við á listanum til Fólkatingsvalið?

Mínar politisku royndir higartil eru í kommunalpolitikki, har mál um viðurskiftini rundanum bygdarfólkið vóru á skránni: bygging av barnaskúla; rakstur og fyrireikan av nýggjum barnagarði, innsavnan av ruski, skipan av spillvatnsleiðingum o.s.fr.. Alt spennandi og týðandi mál fyri vælferð og trivnað í bygdini. Tá eg líti aftureftir, so var tað besta kenslan av, at tað av og á eyðnaðist at gera mun.

Henda kensla av, at tú kanst gera mun, eggjar teg til at luttaka í lands- og fólkatingspolitikki. Politikkur er at vilja; viljin at røkka settum málum; finna loysnir um floksmørk; loysnir, sum ikki bert er lægsti felagsnevnari, men størri og betri enn tað, hvør einstakur einsamallur megnar at finna. Avbjóðingin verður, ikki at fella í ta grøv, har sjálvsnøgd og niðurgerð av øðrum hugsanum setir skránna. Tað skal vera lokkandi at vera í politikki; eitt arbeiðspláss, sum dregur til sín dugnalig, innovativ og hjartagóð fólk.

Hví ikki fara á val og royna nakað nýtt?